Nr. 197 - 15. oktober 2009

# Føroyskur Gajol-pakki

**Ga-jol hevur útskrivað eina kapping á internetinum, har tú kann vera við til at designa ein nýggjan Ga-jol pakka. Millum tey, ið kappast, er Tóra við Keldu, sum hevur designað ein føroyskan pakka**

**KAPPING**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Føroyski Ga-Jol pakkin, sum Tóra við Keldu hevur designað*

Skjótt kunnu vit kanska síggja tann fyrsta føroyskt designaða Ga-jol pakkan. Fyritøkan handan Ga-jol arbeiðir við at designa nýggjar Ga-jol pakkar, og hava fingið 10 kendar designarar at geva sítt boð uppá ein nýggjan Ga-jol pakka. Harafturat hava teir latið upp fyri at vanlig fólk kunnu gerast tann 11. designarin í kappingini.

Millum tey, ið hava verið inni og gjørt ein Ga-jol pakka, er klaksvíksdaman Tóra við Keldu.

- Eg sá í eini sjónvarpslýsing, at ein kapping var, har tú kundi fara inn á heimasíðuna hjá teimum og designa ein Ga-jol pakka, og eg helt tað hevði verið stuttligt, at havt ein føroyskan Ga-jol pakka, sigur Tóra við Keldu.

Hon hevur gjørt tríggjar ymiskar pakkar, og millum teir er hesin á myndini við Merkinum á. Tóra vísir á, at tað eisini eru aðrir føroyskir luttakarar í kappingini, og at tað stendur øllum frítt at fara inn at gera sín egna pakka.

- Men tað hevði verið stuttligt, um føroyingar samlaðu seg um ein pakka, tí tað eru jú nógvar atkvøður, sum føroyingar hava, vísir hon á.

Um vónirnar fyri at júst hesin pakkin gerst ein vinnari, sigur Tóra við Keldu, at hon er ikki hevur ánilsi av, hvussu tað fer at ganga.

- Men eg blívi so øgiliga spent, tá tað eg eri við í slíkum kappingum, og tað hevði verið stuttligt, um vit fingu ein føroyskan Ga-jol pakka, staðfestir hon.

Um nakar hevur hug at fara inn at atkvøða fyri teimum føroysku pakkunum, ella at gera sín egna pakka, so kann hetta gerast á heimasíðuni www.designgajol.dk

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av vestri, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sirm av og á, men onkur sólglotti. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Seinnapartin sama vindferð av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin hvassur vindur av útsynningi, men hann minkar vindin av vestri seinnapartin. Sunnudagin lot av ymsum ættum og turt, men um kvøldið veksur hann vindin av eystri og regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

**September var lýggjur, miðal hitin 10.7°C móti 9,2°C. Avfallið var um miðal 128 mm móti 139 mm**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 14 |
| Madrid | -- |
| Róm | -- |
| Malorca | -- |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og kuldabrúgvin við Føroyar fer í landsynning.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið sunnan fyri Føroyar stendur mestsum í stað og lýggj luft rekur av útsynningi móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/10 kl. 06⁰⁰ – 13/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 12/10 kl. 06⁰⁰ – 13/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 93 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

11. oktober Seinna kvarter
13. oktober Mánin næstur jørðini
18. oktober Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. okt | 04:43 | 17:07 | 03:43 | 16:07 | 03:58 | 16:22 | 06:43 | 19:07 | 07:43 | 20:07 | 02:58 | 15:22 | 01:58 | 14:22 | 04:58 | 17:22 | 05:58 | 18:22 | 04:28 | 16:52 | 05:43 | 18:07 |
| 16. okt | 05:30 | 17:54 | 04:30 | 16:54 | 04:45 | 17:09 | 07:30 | 19:54 | 08:30 | 20:54 | 03:45 | 16:09 | 02:45 | 15:09 | 05:45 | 18:09 | 06:45 | 19:09 | 05:15 | 17:39 | 06:30 | 18:54 |
| 17. okt | 06:17 | 18:41 | 05:17 | 17:41 | 05:32 | 17:56 | 08:17 | 20:41 | 09:17 | 21:41 | 04:32 | 16:56 | 03:32 | 15:56 | 06:32 | 18:56 | 07:32 | 19:56 | 06:02 | 18:26 | 07:17 | 19:41 |
| 18. okt | 07:04 | 19:28 | 06:04 | 18:28 | 06:19 | 18:43 | 09:04 | 21:28 | 10:04 | 22:28 | 05:19 | 17:43 | 04:19 | 16:43 | 07:19 | 19:43 | 08:19 | 20:43 | 06:49 | 19:13 | 08:04 | 20:28 |
| 19. okt | 07:53 | 20:18 | 06:53 | 19:18 | 07:08 | 19:33 | 09:53 | 22:18 | 10:53 | 23:18 | 06:08 | 18:33 | 05:08 | 17:33 | 08:08 | 20:33 | 09:08 | 21:33 | 07:38 | 20:03 | 08:53 | 21:18 |




Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo